## Vagnur gongur á høkjum

Tí er tað eisini ógvuliga ivasamt, um hann verður tøkur til landsdystin um eina viku. – Sum er fái eg ikki sett fótin til, so eg tori als einki at siga um landsdystin, sigur Vagnur Mohr Mortensen, sum gongur á høkjum í løtuni. Hetta kemur sjálvsagt ógvuliga dátt við hjá honum, nú hann er í landsliðshitanum aftur, eftir at hava verið úti í nøkur ár. Vagnur Mohr Mortensen spældi sín fyrsta landsdyst í 2004 og er skrásettur fyri tríggjar av slagnum. Sum støðan er nú, er lítið ið bendir á, at tann fjórði kemur mikukvøldið.



## Svend Fuglø Jacobsen við HB

Nú Vagnur Mohr Mortensen ikki er tøkur hjá Sámal Erik Hentze, hevur venjarin sent boð eftir einum øðrum miðverja. Svend Fuglø Jacobsen er partur av hópinum, sum fer norður til Klaksvíkar hóskvøldið. Svend hevur eins og Vagnur spælt sum miðverji á teimum flestu ungdómslandsliðunum, umframt at hann eisini hevur spælt í bestu føroysku fótbóltsdeildini. Í mun til Vagn hevur Svend eisini spælt eitt skifti í B36 og í TB. Í ár hevur lítið verið at sæð til 23 ára gamla verjuleikaran, sum eisini kann spæla á miðvøllinum, men møguliga kemur hann á vøllin í Klaksvík.

# Mouritsen sleppur ikki úr HB

**Reglurnar um flytingarvindeyga eru greiðar, og tí sleppur Christian Restorff Mouritsen ikki at skifta til B36**



**Spæliloyvið hjá Christian Restorff Mouritsen liggur hjá HB, og tískil kann hann umboða teir á vøllinum á Injector Arena hóskvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var annars tað, sum lá í kortunum, tá B36 skrivaði sáttmála við spælaran fyri einum mánaði síðani. Og Christian Restorff Mouritsen spældi eisini við B36 í tapinum móti NSÍ tann 26. juni, umfram at hann við trimum málum var høvuðsmaðurin í ólavsøkusigrinum móti HB.

Tá komu teir í B36 eisini eftir, at spæliloyvið framvegis ikki varð flutt, og teir royndu alt fyri eitt at fáa hetta í rættlag, hóast freistin í flytingarvindeyganum gekk út tann 27. juli á midnátt.

FSF gav sunnudagin boð um, at teir vildu nýta mánadagin afturat til at viðgera málið, men tá dómurin fall í gjár, var hetta uttan náði.

Reglurnar fyri flytingarvindeygað staðfesta greitt, nær hetta er opið, og tí vildi FSF ikki geva undantak.

Eitt undantak varð annars gjørt í fjør, tá Tór-Ingar Akselsen ikki hevði fingið spæliloyvið við á ferðini úr HB til 07 Vestur. Ta ferðina varð 07 Vestur bjargað á málstrikuni, tí teir høvdu ein FSF-skrásettan sáttmála, og semja var um, at vantandi flytingin av spæliloyvinum skuldi verið fangað, tá sáttmálin varð góðkendur.

B36 hevði hinvegin ikki FSF-skrásettan sáttmála við Christian Restorff Mouritsen, og tí kundu teir ikki nýta tann partin av argumentatiónini hjá 07 Vestur, hóast málini vóru rættiliga lík.

KÍ – HB:

# Klaksvíkingar skulu reisa seg

**Eftir størsta tapið nakrantíð skal KÍ nú syrgja fyri, at kappingarárið ikki verður tað vánaligasta í langa tíð, tí niðurflytingarvandin er ein veruleiki í Klaksvík**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

14 stig í 17 dystum. KÍ liggur næstafast í Vodafonedeildini, hevur skorað næstfægst mál og latið næstflest ígjøgnum. Lagið hevur verið ringt í Klaksvík í langa tíð, men eftir at Todi Jónsson, Atli Danielsen, Páll Klettskarð og Hjalgrim Elttør komu aftur, og liðið vann á 07 Vestur, kveiktist ein lítil vón aftur.

Sunnudagin var liðið tó fullkomiliga eyðmýkt við Margáir. 7-0! Ongantíð áður hevur KÍ tapt so stórt, og um kappingarárið ikki skal fara fullkomiliga í vask, skulu stig á kontoina hóskvøldið.

### Jákup og Todi við

Til hesa uppgávu er KÍ nakað væl betri fyri, enn til dystin í móti EB/Streymi. Jákup Mikkelsen hevur vant í vikuni og verjir málið aftur hóskvøldið. Jógvan Isaksen er við aftur eftir leikbann, og so hevur Todi Jónsson eisini vant niðri um dagarnar uttan stórvegis trupulleikar, so í Klaksvík verður eisini roknað við honum.

KÍ má tó framvegis vera Jógvan Isaksen, sum hevur trupulleikar við lærkrikanum, og Erland Berg Danielsen, ið er langtíðarskaddur, fyriuttan.

Við heimasíðuna hjá fjepparafelagnum Bláa Bylgjan segði formaðurin hjá KÍ, Fríðin Ziskason í gjár, at tey mugu leggja stórtapið aftur um seg og koma víðari.

– Hesa vikuna er umráðandi, at leikarar og øll onnur kring hópin hugsa HB, HB, HB og einki annað, segði hann.

### Vagnur ikki við

Sámal Erik Hentze, venjari hjá HB, hevur eisini síni ting at hugsað um. Ein positivur trupulleiki er Christian Restorff Mouritsen. Sum tað stendur aðrastaðni her á síðuni, varð sáttmáli hansara við B36 ikki galdandi. Tískil er hann tøkur hjá Sámal Erik Hentze hóskvøldið og spennandi verður at síggja, um venjarin fer at gera brúk av liðformanninum á U21-landsliðnum.

Ein annar – keðiligur – trupulleiki er støðan hjá Vagni Mohr Mortensen. Eftir dystin móti 07 Vestur gjørdist greitt, at Vagnur Mohr Mortensen hevði meitt sær fótin og er tískil ikki tøkur. Tí skal nýggjur maður inn í miðverjuna, og hesin kann gerast Svend Fuglø Jacobsen.

Umframt Vagn er eisini Símun Rógvi Hansen skaddur. Hann hevur hann trupulleikar við lærkrikanum í eina tíð. Hesa tíðina hevur Marcin Dawid vart málið hjá HB og tað ger hann eisini hóskvøldið, tá HB skal staðfesta, at teir ikki havi gummibein eftir tríggjar javnleikir á rað og so ein tepran sigur á botnliðnum 07 Vestur sunnudagin.